# Besta semja í fleiri ár

**Arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevarar skrivaðu søgu í morgun, tá ið tey skrivaðu undir ein trý ára sáttmála, sum allir partar eru nøgdir við**

SEMJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag og Jóan Páll Joensen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag, ynskja hvørjum øðrum tillukku. Og tað kunnu tey eisini, tí hvørgin teirra eru ónøgd við úrslitið*

– Hetta er frægasti sáttmáli, vit hava fingið í fleiri ár.

Hetta er skoðsmálið, sum Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, gevur sáttmálanum, sum varð undirskrivað við arbeiðsgevararnar klokkan hálvgum níggju í morgun.

Og starvsfelagið hennara, formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, Hans Joensen, er samdur, tí hann kallar hendan sáttmálan eitt stórt framstig.

Kortini vilja arbeiðarafeløgini ikki strekkja seg longri enn til at siga, at tey eru hampiliga væl nøgd við sáttmálan, tí tey kundu altíð ynskt sær okkurt afturat.

Hinvegin eru tey sera væl nøgd við, at samfelagið slapp undan einum lemjandi arbeiðsteðgi.

Men samstundis hava arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir skrivað arbeiðsmarknaðarsøgu, tí sáttmálin hesuferð er ein trý ára sáttmáli og hetta er fyrstu ferð í søguni at tey skrivað undir ein sáttmála ið gongur yvir trý ár.

Ingeborg Vinther sigur, at hesi trý árini, sáttmálin fevnir um, hækkar lønin nokk so fitt, umframt at eitt prosent verður lagt afturat eftirlønini hvørt ár.

Tilsamans er talan um eina hækking upp á góð 11% í lønum og eftirlønum.

Men harafturat eru viðbøtur hækkaðar, eins og ískoyti fyri starvsaldur er hækkað. Tað merkir, at tann, sum arbeiðir ávíst áramál í sama arbeiði, fær serliga viðbót. Og skiftir løntakari arbeiðsgevara, fylgir starvsaldurin við.

Hans Joensen, formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag kallar sáttmálan eitt stórt framstig, tí uttan at hann hevur roknað tað út nágreiniliga, metir hann, at munurin ímillum láglønt og hálønt er minkað eitt sindur.

Hann heldur, at ein orsøk til, at tað bar til at finna semju, er tann, at arbeiðarafeløgini hava alla tíðina gjørt púra greitt, at tey fóru undir ongum umstøðum at góðtaka eina semju, sum hevði økt enn meiri um stættamunin í Føroyum.

# Dugdu væl at leita eftir semjum

**Bæði arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir rósa semingsmonnunum fyri eitt sera hegnisligt arbeiði semja er um, at teir eiga stóran heiður av, at tað eydnaðist at skriva undir nýggjan sáttmála í morgun**

SEMJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Allir partar eru samdir um, at semingsmenninir, Símun Absalonsen, ytst høgrumegin og Terje Sigurðsson næstytst høgrumegin, eiga rós uppiborið fyri semingsroyndina. Her gj'gnumganga teir semingsuppskotið við Johan Páll Joensen, formanni í Føroya Arbeiðsgevarafelag, ímeðan Ingeborg Vinther og Hans Joensen lurta eftir*

Tá ið tað eydnaðist at finna semju ímillum tey fimm arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnar í morgun, var tað ikki minst semingsmonnunum fyri at takka.

Bæði arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir rósa semingsmonnunum, Terja Sigurðssyni og Símuni Absalonsen fyri avbera hegnisligt arbeiði.

- Semingsmenninir gjørdu eitt gott arbeiði, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at semingsmenninir gjørdu nógv burtu rúr at ganga ímillum partarnar og tí vistu tey alla tíðina, hvat lá á borðinum.

- Teir spældu alla tíðina við púra opnum kortum og sostatt kom semingsuppskotið ikki óvart á okkum, tá ið tað kom. Tað var ein sera góður máti at arbeiða upp á, sigur Ingeborg Vinther

Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag sigur, at Semingsmenninir komu tíðliga við eini skitsu, sum síðani varð bygt út og broytt so hvørt.

- Sostatt vistu vit, nokk so nágreiniliga, hvat kom at standa í semingsuppskotinum, longu tá ið tað varð lagt fram, sigur hann.

Eisini Jan Mortensen gevur semingsmonnunum heiðurin av, at tað hepnaðist so væl.

- Teir eiga avgjørt rós uppiborið fyri at hava gjørt eitt gott arbeiði. Teir arbeiddu nógv, vóru ógvuliga virknir og gingu íðuliga ímillum partarnar. Teir høvdu eisini hugflog og tóku ymisk viðurskifti við, sum ikki eru vanlig at hava við í eini seming, eitt nú spurningin um starvsaldur og skiftivakt. Annars plaga semingar mest at snúgva seg burturav um tímalønir, men alt hetta gjørdi avgjørt sítt til, at tað hepnaðist at finna semju, sigur Jan Mortensen.

### Ongar semingar líkjast

Sjálvir hevur Terji Sigurðsson ikki so góðan hug til at gera so nógv burturúr teirra leikluti.

- Semingsroyndirnar hava verið drúgvari enn tær tykjast, tí vit høvdu samband við partarnar væl áðrenn vit settust á Hotel Føroyum á miðdegi í gjár.

- Vit hava havt samband við partarnar hvør í sær í alla farnu viku, sigur hann

Hann heldur ikki at teir tilvitað løgdu ein øðrvísi taktikk hesuferð, enn teir hava gjørt áður.

- Ongar semingsroyndir eru eins og tað eru ongar semingsroyndir, sum eru lættari ella torførari enn aðrar.

- Tað, sum gjørdi, at tað endaði við semju, var, at báðir partar kendu sína ábyrgd, hóast teir upprunaliga vóru rættiliga ósamdir, sigur Terje Sigurðsson.

Sjálvur vil semingsmaðurin ikki siga, hvussu nógv sáttmálin gevur í lønarhækkingum og sostatt, hvussu nógv, hann kostar arbeiðsgevarunum.

- Tað kann vera ymiskt, hvussu partarnir lesa og tulka sáttmálan, so tað er ikki ein spurningur, sum vit fara at leggja okkum út í, sigur Terje Sigurðsson.